

## Rwandiskir hermenn í Kongo

ST-keldur í Demokratiska Lýðveldinumj Kongo siga, at Rwanda hevur sent umleið 4.000 hermenn til Kongo, har teir berjast saman við stjórnjarherinum ímóti rwandiskum uppreistrarmonnum. ST-talsmaðurin í økinum sigur við tíðindastovurnar, at teir rwandisku stjórnarhermenninir eru sendir til eit øki, har menn hjá uppreistrarherinum FDLR standa sterkir. Hesin uppreistrarherurin fær skyldina av ófriðinum, sum hevur herjað Demokratiska Lýðveldið Kongo tey seinastu árini.

# Bill roynir at skora bílig poeng



*Jonhard Hammer, stjóri á Rás2, undrast stórliga á, at Bill Justinussen hevur meldað Rás2. Bill átti heldur latið løgregluna nýtt tíðina upp á at fanga tey, sum selja ólóglig rúsevni í Føroyum, heldur hann*

**Tað undrar stórliga stjóran á Rás2, Jonhard Hammer, at Bill hevur valt at melda Rás2, vertirnar og ein ónevndan gest á rásini fyri at hava tosað positivt um hassj. – Hann kundi heldur reist málið í tinginum, heldur enn at roynt at skorað nøkur bílig poeng, sigur Jonhard Hammer**

RÁS2 MELDAÐ
Leo Poulsen
leo@sosialurin.fo

Tað var sendingin »Vinstra víkiskylda«, sum tær báðar, Barbara Holm og Tjóðhild Patursson eru vertir fyri, ið eftir øllum at døma fekk sinnið í kók hjá Bill Justinussen. Í hvussu er sigur hann seg hava meldað Rás2, teir báðar vertirnar og ónevnda mannin, sum tær báðar tosaðu við í Rásarúminum í sendingini í síðstu viku.

Evnið í hesum partinum av sendingini var hassj og at varpa ljós á evnið høvdu vertirnir fingið ein ónevndan mann, sum sjálvur í sendingini viðgekk, at hann nýtir evnið, í Rásarúmið at tosa um sínar royndir.

Rás2 hevur nú í eina tíð havt fokus á trupulleikan, og tað var í einum framhaldi av hesum, at maðurin var biðin at koma í Rásarúmið.

Stjórin á Rás2, Jonhard Hammer, skilir als ikki, at Bill skal hava tikið hetta stigið.

– Lat meg fyrst siga, at eg eri ógvuliga fegin um, at Bill Justinussen er ein trúgvur lurtari hjá Rás2, ikki bert tá tíðindasendingarnar eru fyri, men eisini til hvørja undirhalds- og samfelagsliga sending hjá okkum, sigur Jonhard Hammer.

Hann vísir á, at tað nú er ein mánaður síðani, at Miðlahúsið setti fokus á trupulleikan við hassj í Føroyum. Hetta hendi við einari samrøðu í Sosialinum við Beintu Joensen, rúsevnisráðgeva, sum vísti á, at tað flýtur við rúsevnum í Føroyum.

– Hon vísti á, hvussu støðan er á hesum økinum í Føroyum, og vit hava síðani roynt at varpa ljós á trupulleikan og lýst málið frá fleiri síðum við tí fyri eyga at skapa eitt kjak, sigur Jonhard Hammer.

### Brúka tíðina skilabetri

Stjórin á Rás2 metir, at trupulleikin við rúsevnum í Føroyum er ógvuliga stórur, og at tað tí er neyðugt at skapa eitt kjak um evnið, sum kann føra til eina betran av støðuni. Og fyri at kunna skapa eitt kjak er neyðugt, at fólk vilja stilla upp og tosa um tingini, og tað ber sjálvandi ikki til at stýra tí, sum verður sagt í einari beinleiðis sending.

– Vit taka sjálvandi ikki undir við rúsevnum, men vit vilja fegin varpa ljós á, hvussu vandamikil hesi rúsevni eru.

Tað undrar hann, at Bill Justinussen roynir at steðga kjakinum um rúsevnir í Føroyum.

– Tað er kunning og upplýsing sum hjálpir, og ikki bara at seta forboð, sigur stjórin á Rás2.

Hann væntar kortini, at løgtingsmaðurin kemur upp á betri tankar.

– Eg rokni við, at Bill Justinussen fer at hugsa seg um og taka meldingina aftur, og heldur lata løgregluna nýta tíðina upp á at fanga tey, sum ganga runt í Føroyum og selja ólógligu rúsevnini, sigur Jonhard Hammer.

Hann heldur, at Bill Justinussen mátti verið serliga áhugaður í tí, eftir sum júst hansara øki sigst vera eitt hitt mest belastaða í landinum í so máta.

– Men tað er kanska penari bara at nokta fyri at síggja tingini í eyguni og bara tiga alt burtur og lata sum um trupulleikin ikki er til, sigur Jonhard Hammer, stjóri á Rás2 í viðmerking til meldingina av støðini og vertunum.

### Ómansligt

– Eg haldi, at tað er sera ómansligt av einum eldri politikara sum Bill Justinussen at melda tvær ungar kvinnur, sum gera eitt slóðbrótandi arbeiði við at senda útvarp til ungfólk og at upplýsa um vandar í samfelagnum, sigur Jonhard Hammar.

Hann sigur, at Bill Justinussen heldur átti at brúkt sína dýrabæru tíð til eitt nú at sett fram ein fyrispurning í løgtinginum til avvarðandi landsttýrisfólk og t. d. spurt, hvat landsstýrið ger við hendan trupulleikan.

– Men Bill Justinussen velur heldur at fara út í populistisku martyrrolluna, sigur Jonhard Hammer.

- Eg havi spurt hann í morgun, hvat hann hevur gjørt við hetta málið, síðani Sosialurin og Rás2 valdu at taka evnið upp fyri einum mánaði síðani, men hann hevur einki gjørt, uttan at melda tvær ungar kvinnur á Rás2, sigur Jonhard Hammer.

# Ljóðar sum skeiv adressa



*Anna V. Ellingsgaard. Eg havi ikki hoyrt sendingina,og kann tí ikki úttala meg um málið*

**Anna V. Ellingsgaard, forkvinna í felagnum Føroysk Miðlafólk, heldur, at skal Bill Justinussen melda fyri brot á talu-, skrivi- og kunningarfrælsi, átti málið at verði sent til Fjølmiðlanevndina**

RÁS2 MELDAÐ
Leo Poulsen
leo@sosialurin.fo

– Eg havi ikki hoyrt hasa sendingina, og áðrenn eg havi tað, fái eg illa gjørt nakrar viðmerkingar til málið.

Tað sigur Anna V. Ellingsgaard, forkvinna í felagnum Føroysk Miðlafólk.

Hon heldur tó, at tað í fyrstu syftu ljóðar eitt sindur undarligt at melda málið til løgregluna við grundgevingini, at ein fjølmiðil er farin langt út um alt mark fyri skrivi- og talufrælsi.

– Tá ljóðar tað heldur sum eitt mál fyri Fjølmiðlanevndina, heldur forkvinnan í Føroysk Miðlafólk.

Í reglugerðini fyri »Góðan fjølmiðlasið« stendur neyvt útgreinað, hvat fjølmiðlarnir hana skyldu til og hvussu teir eiga at fara fram. Har stendur soleiðis um talu-, skrivi- og kunningarfrælsi:

- Talu-, skrivi- og kunningarfrælsi er utýdningarmiklir grundarsteinar í einum fólkaræði, og fyri at tryggja hetta frælsi krevst, at fjølmiðlar eru óheftir.
- Fjølmiðlar eiga at bera tíðindi, upplýsa, kunna, íbirta orðaskifti og at viðgera samfelagslig mál kritiskt. Fjølmiðlar hava tí serstaka ábyrgd av, at øll viðkomandi sjónarmið verða lýst.
- Fjølmiðlar skulu verja talu-, skrivi- og kunningarfrælsið. Fjølmiðlar eiga tí ikki at lata óviðkomandi áhugamál forða frælsari kunning, frælsari atgongd at heimildum ella forða orðaskifti um samfelagslig mál ella viðurskifti.
- Fjølmiðlar eiga at verja einstaklingar og bólkar fyri órætti frá almennum myndugleikum og stovnum, fyritøkum ella øðrum felagsskapum.
- Fjølmiðlar hava rætt og skyldu at kunna um tað, ið hendir í samfelagnum og at avdúka ivasom viðurskifti.

At síggja til skuldi umrødda málið komið undir seinasta av omanfyri nevndu punktum.

Forkvinnan í Føroysk Miðlafólk leggur sum sagt dent á, at hon ikki fær komið við nøkrum ítøkiligum úttalilsi, fyrr hon hevur hoyrt viðkomandi sending, sum altso varð send í síðstu viku.